Tilmæli

Mælt varð til, at Sjálvbodna sáttmálaískoytið um barnasølu, barnaskøkjulevnað og barnapornografi tilhoyrandi Barnarættindasáttmálanum verður sett í gildið fyri Føroyar.

Mælt varð til, at Sjálvbodna sáttmálaískoytið um at basa og fyribyrgja menniskjahandli, serliga handli við kvinnum og børnum, verður sett í gildi fyri Føroyar.

At offur fyri harðskapi í nærum sambondum, serliga kvinnur og børn, fáa betri vernd.

Uppfylging

Løgtingið samtykti í mai 2013, at Sjálvbodna sáttmálaískoytið tilhoyrandi Barnarættindasáttmálanum skuldi setast í gildi fyri Føroyar. Bíða verður enn eftir at umveldisfyrivarni fyri Føroyar verður tikið aftur.

Sáttmálaískoytið um at basa menniskjahandli hoyrir til ST sáttmálan um at basa skipað brotsverk tvørtur um landamørk. Hesin sáttmáli er ikki er settur í gildi fyri Føroyar, og tískil ber ikki til at taka undir við sáttmála-ískoytinum. Føroyskir myndugleikar hava í hesum sambandi heitt á danskar myndugleikar um at kanna, hvørt sáttmálarnir krevja broyting í ríkislógum, sum eru settar í gildi fyri Føroyar.

Heildarætlan at steðga harðskapi í parlagi og í nærsambondum varð orðað í 2011, og er síðani sett í verk, m.a. við at ein samskipari er settur at arbeiða burturav innan økið.